## Gunnar fekk lítla kapping

**Leygardagin skipaði Tórshavnar Súkklufelag fyri kapping í Landavegsúkkling. Ongin Eli var at geva Gunnar kapping, sum tí fór við sigrinum.**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Leygardagin bleiv kappast í landavegskoyring. Koyrt varð úr Havn til Hósvíkar og aftur til Havnar. Leiðin gekk gjøgnum bergholið báðar vegir, og koyrt bleiv tilsamans 56 km. Startur og mál var við Plantusøluna við Hvítanesvegin.

Kappingin er ein liður í fyrireikingunum til komandi Oyggjaleikirnar, ið verða á Rhodos á sumri 2007. TSF hevur við einari tættari kappingarskrá tikið dystin upp við tíðina, nú bert gott og væl eitt ár er eftir til leikirnar. Á skránni hjá felagnum eru kappingar hvønn mánað fram til oktober.

Unglingasúkklarin Sigmundur Olsson var væl koyrandi leygardagin, og hann megnaði at halda tørn líka til leiðin gekk gjøgnum tunnilin við kós móti Havnini. Tá byrjaði kreftirnar at ganga undan, og Gunnar Dahl-Olsen koyrdi tí ein tryggan sigur heim.

Tað var ikki møguligt hjá Eli Christiansen at luttaka, nú hann í løtuni er uttanlands í arbeiðsørindum.

Tað vóru umleið 18 minuttir millum nummar eitt og tvey, men bert ein góður minuttur millum tvey og trý. Sverri M. Edvinsson gjørdist triður á mál.

Í veteranbólkinum gjørdist Evald Rasmussen vinnari. Hann koyrdi teir 56 km uppá tveir tímar og 22 minuttir.

**ÚRSLIT**

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Gunnar Dahl-Olsen | 1.55.15 |
| 2 | Sigmund Olsson | 2.13.28 |
| 3 | Sverri M. Edvinsson | 2.15.11 |

# Tey bestu gjørdu sína skyldu

**Tey átta feløgini, sum eru eftir í kappingini um Løgmanssteypið, spæla øll í bestu deildini. Eingin av teimum fremstu var tikin á bóli um vikuskiftið, men á Skála lá sensatiónin og lúrdi eina stutta løtu, og EB/Streymur fekk ein kvøkk ímóti B71**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Besta deildin eigur øll allar átta luttakararnar, sum framvegis hava møguleika at vinna Løgmanssteypið 2006.

Einastu feløgini í Formuladeildini, sum ikki eru partur av steypakappingini, eru VB/Sumba og ÍF. Tey bæði feløgini taptu ímóti ávíkavist HB og B68.

Lutakastið til fjórðingsfinalurnar verður í 3-2 sendingini mánakvøldið. Tá verður funnið fram til, hvørjum hesi átta skulu dystast móti: KÍ, GÍ, EB/Streymur, Skála, NSÍ, B68, B36 og HB.

Fjórðingsfinalurnar verða spældar Kristi Himmalsferðardag, sum verður hósdagin 25. mai.

### Gekk sum roknað varð við

Tað var einki óvæntað úrslit í steypadystunum, sum vórðu spældir um vikuskiftið. Feløgini í Formuladeildini vunnu sínar dystir, hóast okkurt av teimum skuldi stríðast hart fyri tíð.

Í fýra av dystunum vóru fleiri mál á muni, meðan hinir dystirnir vóru nakað tættari, og á Toftum varð neyðugt við bæði longdari leiktíð og brotssparkskapping.

Ein av dystunum, sum var á skránni, var ikki spældur. Hetta var dysturin ímillum KÍ og Fram. Kappingarnevndin hjá FSF koyrdi Fram úr kappingini, tí felagið hevði brúkt óskrásettar spælarar, og støðan var tann sama hjá NFÍ, sum kundi tikið við eftir Fram.

### Skála skuldi stríðast

AB verður roknað sum eitt av sterkastu liðunum í næstbestu deildini í ár, og teir gjørdu eisini um seg á Skála leygardagin.

Seint í dystinum legði Allan Mørkøre AB á odda, men Skála megnaði at javna beint aftaná, og so varð neyðugt við umdysti, har Pætur Dam Jacobsen gjørdi sigursmálið hjá Skála.

Eisini EB/Streymur fekk ein lítlan hvøkk, tí hóast teir vóru á odda 2-0 í heimadystinum ímóti B71, stóð tað knappliga á jøvnum. B71 minkaði og javnaði, áðrenn Hans Pauli Samuelsen gjørdi sigursmálið hjá EB/Streymi

Á Toftum var lívligt leygardagin. B68 og ÍF spældu ein javnan dyst, sum varð avgjørdur við brotssparkskapping. Seinastu løtuna spældi B68 við 9 monnum, tí tveir høvdu fingið reyða kortið, men toftamenn hildu skansan og vunnu brotssparkskappingina.

### Greiðir sigrar

Fýra av formulaliðunum vunnu greiðar sigrar í sínum dysti. Í Sørvági vitjaði NSÍ, og har var heimaliðið rættiligt treiskt. Christian Høgni Jacobsen legði NSÍ á odda í seinna hálvleiki, men SÍ svaraði aftur við máli av Messias Pereira. Síðani mannaði NSÍ seg upp og skoraði trý mál afturat. Christian Høgni gjørdi hattrick.

Føroyameistararnir í B36 høvdu vitjan av TB, sum flutti úr bestu deildini í fjør, og stórur munur var millum liðini leygardagin. B36 vann heili 5-0, og tað var sigandi fyri gongdina í dystinum, har havnaliðið var greitt omaná allatíðina.

Í Gøtu spældu grannarnir GÍ og LÍF, og her var tað liðið úr bestu deildini, sum vann dystin. GÍ var á odda 2-1 í hálvleikinum, og í seinna hálvleiki øktu tær gulu tvær ferðir.

HB hevði vitjan av Sumba/VB, og heimaliðið vann 4-1. Í hálvleikinum var HB frammanfyri 2-1, og í seinna hálvleiki skoraðu teir tvær ferðir afturat.



*Í fjør hevði B36 sínar trupulleikar av TB, men leygardagin var tó eingin ivi í dystinum í Gundadali*

## FAKTA

**KAPPINGIN UM LØGMANSSTEYPIÐ**

**SÍ-NSÍ 1-4 (0-0)**
0-1: Christian Høgni Jacobsen
1-1: Messias Perreira
1-2: Jónstein Petersen
1-3: Christian Høgni Jacobsen
1-4: Christian Høgni Jacobsen

**B68-ÍF 5-4** eftir umdyst og brotsspørk. 1-1 (1-0)
1-0: Súni Fríði Barbá
1-1: Bartal Eliasen

**B36-TB 5-0 (2-0)**
1-0: Fróði Benjaminsen
2-0: Sylla D. Amed
3-0: Obi
4-0: Fróði Benjaminsen
5-0: Fróði Benjaminsen

**GÍ-LÍF 4-1 (2-1)**
1-0: Hans Jørgen Djurhuus
2-0: Sámal Joensen
2-1: Símun Waag Høgnesen
3-1: Sámal Joensen
4-1: Kaj Ennigarð

**EB/Streymur-B71 3-2 (2-0)**
1-0: Hans Pauli Samuelsen
2-0: Egil á Bø
2-1: Clayton Soares
2-2: Clayton Soares
3-2: Hans Pauli Samuelsen

**Skála-AB 2-1 (0-0) (eftir umdyst)**
0-1: Allan Mørkøre
1-1: Jónhard Frederiksberg
2-1: Pætur Dam Jacobsen

**HB-VB 4-1 (2-1)**
1-0: Jákup á Borg
2-0: Rasmus Nolsøe
2-1: Jákup Olsen
3-1: Páll M. Joensen
4-1: Jóhan E. R. Mouritsen

**KÍ-Fram** (KÍ víðari uttan dyst)

# Føroyingarnir klára ikki at vinna

**Annað vikuskiftið á rað leikti AaB – við tveimum føroyingum á liðnum – javnt ímóti botnliðnum SønderjyskE**

SUPERLIGA
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Teir báðir Súni Olsen og Jón Rói Jakobsen fingu aftur fulla spælitíð um vikuskiftið. Mótstøðuliðið hjá AaB var tað sama sum seinasta vikuskiftið, og úrslitið gjørdist aftur hesuferð 2-2, sum má vera eitt vónbrot fyri AaB.

Tað kundi tó verið verri, tí SønderjyskE var frammanfyri 2-0 eitt skifti í seinna hálvleiki. Peter Sand legði útiliðið framum fyri steðgin, og tíggju minuttir inn í seinna hálvleik økti Peter Nymann til 2-0, eftir at rangstøðufellan hjá Aab kiksaði.

### Jón Rói við í máli

SønderjyskE hevði ein gyltan møguleika at leggja seg framum við trimum málum, men Jón Rói fekk bjargað á sjálvari málstrikuni. Minuttin eftir minkaði AaB so til 1-2, tá Caca skallaði bóltin í netið eftir fríspark og upplegg frá Jón Róa. Aab fekk eisini útjavnandi málið, tá fimm minuttir vóru eftir at leika, og tað var aftur brasiliumaðurin Caca, ið skoraði.

Súni Olsen hevði nakrar royndir útifrá við sínum vandamikla vinstrabeini, men hepnið var ikki við honum hesuferð. Mikukvøldið vitja Jón Rói, Súni og hinir liðfelagarnir í Aab í Parkini, har FCK verður mótstøðuliðið.